Umhvørvismálaráðið

Dagfesting:	07.04.2025
Mál nr.:	25/08961
Málsviðgjørt:	ARØ
Ummælistíð:	N/A
Eftirkannað:	31.03.2025

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (ALS-lógin)
(Broytingar í fiskimannaskipanini)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (ALS-lógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 42 frá 25. mars 2025, verður í § 20 a, stk. 1, "løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap" broytt til: "løgtingslóg um sjófeingi", "30 dagar" broytt til: "15 dagar", og "60 útgjaldsdagar" broytt til: "90 útgjaldsdagar".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Fyrr í hesi tingsetuni viðgjørdi Løgtingið lógaruppskot um broytingar í ALS-lógini, LM-046/2024. Broytingarnar komu í gildi 26. mars 2025. Talan var um eina røð av broytingum, ið vóru við til at gera ALS-lógina betur hóskandi til umstøðurnar á arbeiðsmarknaðinum, og sum vóru grundaðar á eina heildarendurskoðan hjá stýrinum fyri ALS. Bæði undir fyrstu viðgerð av uppskotinum og undir nevndarviðgerðini vórðu umstøðurnar hjá fiskimonnum í ALS-skipanini viðgjørdar. Fiskimannafelagið hevur sett fram ynski um at stytta karensdagarnar úr 30 døgum niður í 15 dagar og at leingja útgjaldstíðarskeiðið úr 60 útgjaldsdøgum upp í 90 útgjaldsdagar. Av tí, at hesi viðurskiftir ikki vóru partur av lógaruppskotinum hjá landsstýriskvinnuni, bar ikki til at gera hesar broytingar, eftir at lógaruppskotið var lagt fram í Løgtinginum. Eftirfylgjandi er stýrið fyri ALS vorðið samt um at taka undir við at gera nevndu broytingar í ALS-lógini. Tískil verður nú skotið upp at gera hesar broytingar.

1.2. Galdandi lóggáva

Í § 20 a í ALS-lógini er ein serskipan fyri fiskimenn í arbeiðsloysisskipanini. Fiskimannaskipanin hevur við sær, at fiskimenn, sum eru við fiskiskipum, sum hava veiðiloyvi sambært løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, hava rætt til arbeiðsloysisstuðul 30 dagar aftaná, at skipið er lagt vegna umvælingar, hóast setanarliga tilknýtið millum fiskimannin og reiðaríið ikki er av. Goldið verður í mesta lagi fyri 60 útgjaldsdagar. Fyri hvørjar kr. 1.000,-, sum útrokningargrundarlagið hjá fiskimanninum fer upp um upphæddina, nevnda í § 16, stk. 2, minkar útgjaldið við 0,5 prosentstigum.

Um so er, at eitt fiskiskip verður lagt til umvælingar, og umvælingin tekur styttri enn 30 dagar, hevur fiskimaðurin ikki rætt til arbeiðsloysisstuðul.

Fiskimaður hava annars rætt til arbeiðsloysisstuðul eftir vanligu reglunum. Tað vil siga, at um fiskimaður sigur seg úr starvi ella verður sagdur úr starvi, so hevur viðkomandi rætt til arbeiðsloysisstuðul á jøvnum føti við aðrar persónar, sum verða arbeiðsleysir.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at stytta karantenuna hjá fiskimonnum og leingja tíðarskeiðið, teir hava rætt til arbeiðsloysisstuðul, tá ið fiskiskipið, teir eru við, verður lagt vegna umvælingar.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Lógaruppskotið hevur við sær, at tá ið fiskiskip, sum hevur veiðiloyvi sambært løgtingslóg um sjófeingi, verður lagt vegna umvælingar, hava fiskimenninir rætt til arbeiðsloysisstuðul 15 dagar fyrr, enn teir hava nú. Fiskimenn kunnu við øðrum orðum fáa arbeiðsloysisstuðul 15 dagar aftaná, at fiskiskipið er lagt vegna umvælingar, í mun til aftan á 30 dagar, sum støðan er nú.

Lógaruppskotið hevur eisini við sær, at nevndu fiskimenn kunnu fáa arbeiðsloysisstuðul 30 dagar longur enn nú. Skotið verður nevniliga upp at leingja útgjaldsdagarnar til fiskimenn, tá ið fiskiskipið verður lagt vegna umvælingar, úr 60 útgjaldsdøgum upp í 90 útgjaldsdagar.

Broytingar verða ikki gjørdar í útrokningargrundarlagnum hjá fiskimonnunum.

Eisini verður ein fylgibroyting gjørd í sambandi við, at løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap er sett úr gildi, og løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi er komin í staðin.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið hevur ikki verið til almenna hoyring, tí at tíðin, til Løgtingið fer í summarfrí, nærkast, og stundir hava tí ikki verið til at senda uppskotið til hoyringar. Tó er brot úr skrivi frá Føroya Fiskimannafelag til stýrið fyri ALS, dagfest 18. september 2024, endurgivið niðanfyri.

Harumframt hevur Løgtingið umrøtt umstøðurnar hjá fiskimonnum í ALS-skipanini bæði undir fyrstu viðgerð av LM-046/2024 og í nevndarviðgerðini av LM-046/2024. Av tí at umstøðurnar hjá fiskimonnum ikki vóru partur av tí lógaruppskotinum, bar ikki til at gera ynsktu broytingarnar. Upplýst varð fyri Rættarnevndini, at spurningurin varð viðgjørdur í stýrinum fyri ALS. Nú hevur stýrið fyri ALS boðað Umhvørvismálaráðnum frá, at stýrið er vorðið samt um at ganga ynskjunum frá Føroya Fiskimannafelag á møti. Tí verður nýtt lógaruppskot hesum viðvíkjandi lagt fram nú.

Brot úr skrivi frá Føroya Fiskimannafelag til stýrið fyri ALS, dagfest 18. september 2024:

> "*Nevndin fyri Føroya Fiskimannafelag heitir á Stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina um, at mæla landsstýrinum til at taka 30 daga regluna og 60 daga regluna hjá fiskimonnum upp av nýggjum, umframt at útrokningargrundarlagið verður broytt.*
>
> *Talan er um ásetingar nevndar í § 20a, stk. 1 í ALS-lógini, sum í løtuni er orðað soleiðis:*
>
> > "Fyri fiskimenn, sum eru við fiskiskipum, sum hava veiðiloyvi sambært løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, og sum verða løgd vegna umvælingar, verður arbeiðsloysisstuðul goldin eftir 30 dagar, frá tí at skipið varð lagt, hóast setanarliga tilknýtið millum fiskimannin og reiðaríið ikki er av. Goldið verður í mesta lagi fyri 60 útgjaldsdagar. Fyri hvørjar kr. 1.000,-, sum útrokningargrundarlagið hjá fiskimanninum fer upp um upphæddina, nevnda í § 16, stk. 2, minkar útgjaldið við 0,5 prosentstigum."
>
> ***30 daga reglan***
> *Talan er um ásetingina um nær fiskimenn kunnu koma upp í arbeiðsloysisskipanina. Vit halda, at dagatalið, sum fiskimenn skulu bíða, til teir sleppa upp í ALS-skipanina, er ov long. Í dag skulu fiskimenn bíða í heilsar 30 dagar til teir fáa ALS-útgjald. Vit halda, at henda áseting skal broytast soleiðis, at fiskimenn skulu bíða 15 dagar til teir fáa ALS-útgjald. (sí § 20a, stk. 1, nr. 1.)*
>
> ***60 daga reglan***
> *Talan er um ásetingina um, hvussu leingi goldið verður út. Vit halda, at talið av útgjaldsdøgum er ov stutt. Í dag verður í mesta lagi goldið fyri 60 útgjaldsdagar. Vit*

halda, at henda áseting skal broytast soleiðis, at tað í mesta lagi verður goldið fyri 90 útgjaldsdagar. (sí § 20a, stk. 2, nr. 2)

[.....]

Grundgeving
Sum yvirlitið frá ALS umsitingini vísir, so hevur skipanin ikki útgoldið nógvar pengar til fiskimenn síðan 2015.

Fyri alt tíðarskeiðið 2025 til og við 2020 hevur ALS tilsamans útgoldið 83.253 kr. til 41 fiskimenn.

Ár	Tal av persónum	Samlað tímatal	Samlað útgjald
2015	8	117	924
2016	11	912	37.956
2017	1	72	5.316
2018	6	144	4.601
2019	5	104	4.675
2020	10	1.050	29.783
Íalt	41	2.399	83.253

ALS umsitingin hevur upplýst fyri Fiskimannafelagnum, at ongar umsóknir eru komnar frá fiskimonnum fyri árini 2021, 2022 og 2023.

Nevndu broytingar gera, at fiskimenn koma 15 dagar fyrr upp í skipanina og fáa útgjald 30 dagar longri, umframt at útrokningargrundarlagið verður dagført.

Broytingin kollveltir ikki ALS fíggjarliga, meta vit.

Vísandi til lágu útgjøldini til fiskimenn frá 2015 til 2023 kann ALS-stýrið vónandi ganga fiskimonnum hesum á møti við at mæla Landsstýrinum til, at leggja fram lógarbroytingar í ALS-lógini sambært omanfyri nevnda."

Í skrivinum stendur eitt sindur um útrokningargrundarlagið í § 20 a. Undir nevndarviðgerðini av LM-046/2024, skjal A: Skriv frá Føroya Fiskimannafelag, kom fram, at útrokningargrundarlagið kortini ikki er partur av ynskjunum hjá Føroya Fiskimannafelag.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur ikki beinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan ella kommunurnar.

Lógaruppskotið kann hava við sær økt útgjøld úr ALS-grunninum, tí at sokallaða fiskimannaskipanin í § 20 a í ALS-lógini verður broytt soleiðis, at fiskimenn, sum lúka treytirnar fyri at fáa arbeiðsloysisstuðul eftir skipanini, fáa arbeiðsloysisstuðul fyrr enn nú og longur enn nú.

Verður hugt at lógarviðmerkingunum til § 20 a í ALS-lógini sæst, at útgjøldini sambært serskipanini hava verið munandi lægri, enn upprunaliga mett. Her er brot úr lógarviðmerkingunum í løgtingsmáli nr. 179/2008:

> "*Grein 20 A (Serskipan fyri fiskimenn):*
> *Ilt er at meta um ávirkanina, við tað at eingi hagtøl eru til taks. ALS hevur tí vent sær til Fiskimannafelagið fyri at fáa eina meting av hesi áseting.*
>
> *Fiskimannafelagið vísir til eina uppgerð, sum sigur, at tað eru umleið 30 skip, sum árliga kunnu koma undir hesa áseting, og at tað eru áleið 375 fiskimenn við hesum skipum, sum tilsamans liggja í áleið 67 dagar.*
>
> *Við uppskotinum til hækkan av stuðli eftir grein 16 merkir hetta, at hesir fiskimenn kunnu fáa í mesta lagi 759 950 fyri hvønn útgjaldsdag fyri í miðal 37 dagar (67 dagar frároknað karantenu á 30 dagar).*
>
> *Hetta gevur ein kostnað á áleið 10,5 mió. kr.*"

Árini 2021-2024 móttók ALS onga umsókn um útgjald til fiskimenn sambært § 20 a í ALS-lógini. Niðanfyri sæst yvirlit yvir útgjøld gjøgnum fiskimannaskipanina árini 2015-2020:

Ár:	Tal av persónum	Upphædd tils.:
2015	8	923,70 kr.
2016	11	24.671,62 kr.
2017	3	18.599,53 kr.
2018	6	4.600,82 kr.
2019	5	4.675,03 kr.
2020	10	29.782,78 kr.
Íalt	43	83.253,48 kr.

Roknast má við, at lógarbroytingin fer at hava við sær, at ALS fer at fáa fleiri umsóknir sambært fiskimannaskipanini enn nú. Orsøkin er, at sambært galdandi reglum hava fiskimenn rætt til arbeiðsloysisstuðul, tá ið fiskiskipið er til umvælingar í longur enn 30 dagar. Við uppskotinum fara umvælingar av fiskiskipum, sum vara í longur enn 15 dagar, at geva rætt til arbeiðsloysisstuðul.

Eisini verða útgjaldsdagarnir longdir úr 60 upp í 90. Hetta fer væntandi at hava øktar útreiðslur við sær. Ilt er at meta um, júst hvussu nógv útreiðslurnar fara at økjast.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar við sær fyri land ella kommunur.

Væntast má, at lógaruppskotið fer at hava nakað av øktari umsiting við sær fyri ALS, sum helst fer at móttaka fleiri umsóknir um arbeiðsloysisstuðul sambært fiskimannaskipanini í § 20 a í ALS-lógini.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar við sær fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur við sær betri treytir til fiskimenn í Arbeiðsloysisskipanini. Uppskotið hevur við sær, at fiskimenn, sum eru við fiskiskipum, sum hava veiðiloyvi sambært løgtingslóg um sjófeingi, fáa rætt til arbeiðsloysisstuðul fyrr og longur enn eftir galdandi reglum, í sambandi við at fiskiskipið verður lagt vegna umvælingar. Broytingarnar fara helst at hava við sær, at fleiri fiskimenn fara at fáa rætt til arbeiðsloysisstuðul, tí at eisini styttri umvælingar nú fara at geva rætt til arbeiðsloysisstuðl, umframt at útgjaldsdagarnir fara úr 60 upp í 90.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið er ikki í ósamsvari við Hoyvíkssáttmálan, evropeiska mannarættindasáttmálan, EMRS, ella sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur markaforðingar við sær.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv

Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir og ger ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar so sum upplýsingarskyldu, skrásetingarskyldu ella t.d. krøv um loyvi.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrisfólkið at áseta nærri reglur. Tó hevur lógaruppskotið við sær, at verður tað samtykt, verður neyðugt at gera fylgibroytingar í kunngerð nr. 101 frá 20. juli 2009 um útgjald til fiskimenn, tá ið skip teirra verða løgd vegna umvælingar.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur aðrar avleiðingar enn omanfyri tilskilað.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Ja	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Sambært galdandi § 20 a í ALS-lógini hava fiskimenn, sum eru við fiskiskipum, sum hava veiðiloyvi sambært løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, rætt til arbeiðsloysisstuðul 30 dagar aftaná, at skipið er lagt vegna umvælingar, hóast setanarliga tilknýtið millum fiskimannin og reiðaríið ikki er av. Goldið verður í mesta lagi fyri 60 útgjaldsdagar. Fyri hvørjar kr. 1.000,-, sum útrokningargrundarlagið hjá fiskimanninum fer upp um upphæddina, nevnda í § 16, stk. 2, minkar útgjaldið við 0,5 prosentstigum.

Endamálið við lógaruppskotinum er at stytta karantenuna hjá fiskimonnum og leingja tíðarskeiðið, teir hava rætt til arbeiðsloysisstuðul.

Lógaruppskotið hevur við sær, at tá ið fiskiskip, sum hevur veiðiloyvi sambært løgtingslóg um sjófeingi, verður lagt vegna umvælingar, fáa fiskimenninir rætt til arbeiðsloysisstuðul 15 dagar aftaná, at fiskiskipið er lagt vegna umvælingar, í mun til aftan á 30 dagar, sum støðan er nú.

Lógaruppskotið hevur eisini við sær, at nevndu fiskimenn kunnu fáa arbeiðsloysisstuðul, tá fiskiskipið verður lagt vegna umvælingar, í 90 útgjaldsdagar í mun til 60 útgjaldsdagar, sum støðan er nú.

Broytingar verða ikki gjørdar í útrokningargrundarlagnum hjá fiskimonnunum.

Nærri reglur um fiskimannaskipanina eru ásettar í kunngerð nr. 101 frá 20. juli 2009 um útgjald til fiskimenn, tá ið skip teirra verða løgd vegna umvælingar.

Eisini verður ein fylgibroyting gjørd í sambandi við, at løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap er sett úr gildi, og løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi er komin í staðin.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Umhvørvismálaráðið, 7. apríl 2025

Margit Stórá
landsstýriskvinna

/ Pól E. Egholm

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Skriv frá Føroya Fiskimannafelag til stýrið fyri ALS, dagfest 18. september 2024